52-159/2020

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 159/20 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Sirið Stenberg, løgtingsmanni, um framferðina hjá Samherja**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Metir løgmaður, at FAS-skipanin er misnýtt til at gjalda hýrur til namibiskar fiskimenn ?
2. Hvørjar viðmerkingar hevur løgmaður til, at Samherji hevur goldið 17 mió. kr. til TAKS, tá ið málið kom alment fram ?
3. Kann løgmaður veita vissu fyri, at ásetingarnar í sjófeingislógini um útlendskan ognarskap í fiskivinnuni eru hildnar ?
4. Ætlar løgmaður at taka stig til at gera nærri kanningar av málinum ?
5. Hvat heldur løgmaður um framferðarháttin hjá Samherja, nú tað er komið fram, at føroysk fjølmiðlafólk eru fyri ágangi.
6. Hvat heldur løgmaður um, at Samherji boðaði frá, at felagið hevði fingið váttan frá stjóranum í TAKS um, at TAKS ikki kannaði málið ?
7. Heldur løgmaður, at framferðarhátturin eigur at fáa avleiðingar fyri felagið ?

**Svar:**

**Til nr. 1**

Tað er ásett í § 63a í skattalógini, at reiðaravirki kann fáa afturborið part av lønini, sum reiðaravirkið rindar persóni fyri tænastu umborð á FAS-skrásettum skipi. Sbrt. stk. 7, í somu grein, ásetir landsstýrismaðurin afturberingsprosetið við kunngerð. Landsstýrismaðurin hevur við kunngerð nr. 120/2013 ásett afturberingsprosentið at vera 35% árliga.

Tað framgongur beinleiðis av § 2 í løgtingslóg um Føroysku Altjóða Skipanskrá, at fiskifør og stuttleikabátar ikki kunnu verða tikin upp í Føroysku Altjóða Skipaskránna.

Fíggjarmálaráðið metir tí, at tá tað so verður staðfest, at FAS-skipanin er nýtt til at gjalda hýrur til namibiskar fiskimenn, er tað ilt at koma til aðra niðurstøðu enn, at FAS-skipanin er misnýtt.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

**Til nr. 2**

Samherji rindaði 17 mió. kr. til TAKS, tá ið málið kom alment fram.

Sambært Fíggjarmálaráðnum arbeiðir TAKS við málinum. Enn er tó ikki komið á mál. Eisini hevur TAKS meldað málið til løgregluna

**Til nr. 3**

Eg havi spurt meg fyri hjá Fiskimálaráðnum. Tey hava biðið Vørn, sum er stovnur undir Fiskimálaráðnum, og umsitur ásetingarnar í sjófeingislógini um ognarviðurskifti, um at gera viðmerkingar til spurningin.

Vørn vísir á, at Vørn hevur eftirlit við, at ognarviðurskifti í feløgum, sum virka í fiskivinnuni í Føroyum, eru í samsvar við lóg um sjófeingi. Fyri at reka vinnuligan fiskiskap krevst, at eigarin av fiskifarinum er persónur ella felag, sum til einhvørja tíð er heimahoyrandi í Føroyum og lýkur treytirnar í § 11. Greinin hevur fleiri ásetingar, harundir allýsing av hugtakinum "heimahoyrandi" og mørk fyri, hvussu stóran part útlendsk feløg kunnu eiga í føroyskum feløgum. Markið er 25 % fyri nýggj feløg, sbrt. § 11, stk. 4, nr. 4.

Tey feløg, sum høvdu rættindi at veiða, áðrenn lógin kom í gildi 1. januar 2020, hava tó loyvi til at hava 33 % útlendskan ognarskap, sbrt. undantaksregluni í § 12, stk. 3. Sp/f Framherji er ímillum hesi.

Sambært teimum upplýsingum, sum Vørn hevur, lýkur Sp/f Framherji treytirnar í lógini. Sbrt. eigarabókini hjá Sp/f Framherji eiga persónar heimahoyrandi í Føroyum 66,6 % og Sp/f Framinvest 33,33 % av partapeninginum. Sbrt. eigarabókini hjá Sp/f Framinvest eiga persónar heimahoyrandi í Føroyum 27% og Samherji HF 73 % av partapeninginum. Hetta merkir, at Samherji HF eigur 24 % av partapeninginum í Sp/F Framherji, og hetta er undir 33%, sum er markið, sbrt. § 12, stk. 3.

**Til nr. 4**

Eg ivist ikki í, at røttu myndugleikarnir fara at taka málið upp til eftirmetingar við støði í teimum upplýsingum, sum eru komnir fram seinastu mánaðirnir.

**Til nr. 5**

So leingi, sum persónar og vinnufeløg, sum verða lýst journalistiskt, seta í verk lóglig móttiltøk at tryggja síni áhugamál, ber illa til hjá løgmanni at hava nakra viðmerking til tað. Er tað so, at persónarnir ella vinnufeløgini í hesum sambandi taka ólóglig stig, so er tað eitt mál, sum løgreglan má taka upp.

**Til nr. 6**

Stjórin á TAKS hevur alment afturvíst, at grundarlag er fyri hesum uppáhaldi. Løgmaður hevur álit á tí, sum stjórin á TAKS hevur víst á hesum viðvíkjandi.

52-159/2020



**Til nr. 7**

Tá Samherji er eitt útlendskt felag, fellur tað uttan fyri málsræðið hjá landsstýrinum at taka støðu til, hvørt framferðarhátturin hjá Samherja eigur at fáa avleiðingar fyri felagið.

Í Tinganesi, 8. juni 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður